Kanna nú allar upplýsingar um Ellisheimið

Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag í svárari neyð. Starvsfólk og arbeiðsgevarar í sama felag.



Vegna starvsfólkið kravdi álitiskvinnan ymisk viðurskifti á Ellisheiminum rættað. Friggjadagin í seinastu viku fekk hon uppsøgnian sendandi. Arbeiðið á Ellisheiminum gongur tó sum vant.

Tað gongur seint við at loysa málið um uppsøgnina av álitiskvinnuni á Ellisheiminum í Havn. Álitiskvinnan varð uppsøgd 1. februar.

Tey flestu fakfeløgini høvdu í einum slíkum føri kravt álitiskvinnuna aftur í starvið beinan vegin. Men so einfalt er tað ikki hjá Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag, heldur næstformaðurin Øssur Simonsen. Av tí at tann uppsagda álitiskvinnan samstundis er forkvinna í felagnum, virkar Øssur Simonsen í løtuni sum formaður.

Tey flestu, sum starvast á stovnum undir Tórshavnar býráð, eru limir í Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag. Bæði starvsfólk, stovnsleiðarar, deildarleiðarar o.s.fr.

— Hetta er ein fløkt støða at vera í, sigur Øssur Simonsen. Allir partar eru limir, og tí noyðist nevndin at tosa við øll, áðrenn hon kann taka støðu.

Fyrr í vikuni var nevndin og tosaði við sosialdeildarleiðaran og við leiðslu og starvsfólk á Ellisheiminum. Í gjár fór nevndin at tosa við ta uppsøgdu álitiskvinnuna. Ikki fyrr enn nevndin hevur tosað við øll og hevur fingið allar upplýsingar, viðgjørt klagur og annað, kann nevndin taka nakra støðu, sigur Øssur Simonsen.

— Men undir øllum umstøðum fara vit at krevja, at lógir og sáttmáli verða hildin, sigur hann.

Øssur viðgongur, at tað er ógvuliga óheppið at hava eitt felag fyri øll, høg og lág, sum starvast hjá býráðnum. Tað ger at felagið ikki kann virka sum fakfelag. Uttan so at mótparturin var uttan fyri felagið. Tað er hann ikki í hesum málinum. Báðir partar eru limir, og tí noyðist felagið at lurta líka nógv eftir báðum.

Gera sum Starvsmannafelagið

Torført er at finna skil á, hvussu Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag virkar. Øssur Simonsen hevur ikki verið limur í nevndini í meira enn eitt ár, og tí kennir hann einki til nakrar lønarsamráðingar.

Felagið hevur ein sáttmála við Tórshavnar býráð. Men tað er út í ævir sami sáttmáli, ið (hitt) Starvsmannafelagið hevur við Føroya Landsstýri — ein avskrift. **randi**

Torførari at uppsiga trygdarumboðum

Nú verður eitt sindur torførari hjá arbeiðsgevarum at siga trygdarumboð upp. Týsdagin lýsti landsstýrið eina kunngerð, ið sigur, at minst eina viku, áðrenn trygdarumboð verður sagt upp, skal arbeiðsgevarin kunna Arbeiðseftirlitið um uppsøgnina, soleiðis at Arbeiðseftirlitið kann kanna viðurskiftini í sambandi við uppsøgnina.

Fakfeløgini hava leingi gjørt vart við, at trygdarumboðini ikki eru nóg væl vard. Uppgávan hjá trygdarumboðunum er vegna starvsfólkiðat gera vart við vantandi trygd og vánaligar arbeiðsumstøður. Men gera tey tað, kunnu tey vænta at vera søgd upp. Fakfeløgini siga eisini, at hetta hendir meira enn so. Sambært reglunum kann eitt trygdarumboð ikki sigast upp fyri trygdararbeiði sitt. Tí verða aðrar grundgevingar brúktar fyri at siga tey upp. Fakfeløgini hava mælt til, at trygdarumboð fáa longri uppsagnartíð, men hetta var tað longsta, vit kundu koma, sigur Eli Davidsen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum.

Hann dugir ikki at meta, um henda skerjingin í kunngerðini fer at gera nakran mun. Men hetta er í hvussu er ein roynd, sigur Eli Davidsen.

Ov fá velja trygdarumboð

Arbeiðseftirlitið heitir við nøkulunda jøvnum millumbili á arbeiðsplássini um at velja síni trygdarumboð. Sum tey hava skyldu til. Eli Davidsen sigur, at skrivstovur, onkrir handlar og skúlar eru tey frægastu arbeiðsplássini at velja trygdarumboð. Í idnaðinum stendur verri til. Flakavirkini fingu tó nógv valt síni umboð, tá triggir fysioterapeutar fyri einum ári síðan fyri Arbeiðseftirlitið vitjað øll flakavirkini.

Á summum arbeiðsplássum vil eingin vera trygdarumboð. Umberingin er, at tey óttast uppsøgn, um tey taka trygdararbeiðið í álvara.

Kuldaávirkanin kannast á flakavirkjunum

Saman við Hygiejnisk Institut í Árhus fer Arbeiðseftirlitið nú at kanna, hvussu kuldin í arbeiðinum ávirkar flakakvinnurnar. T.v.s. tá kvinnurnar standa og skera flak við køldum vatni rennandi eftir borðinum.

Tað hevur ofta verið frammi, at flakakvinnurnar kenna stóran ampa av tí kalda vatninum, ið rennir eftir skeriborðunum. Nógvar hava pínu í fingrunum, og summar fáa eisini eins og deyðar fingrar. Hetta verður nevnt í øllum kanningum, ið gjørdar eru av arbeiðsumstøðunum í flakavirkjum.

Tá fysioterapeutarnir Unn Dimon, Tina Hammerlund og Dánjal Pauli Haraldsen løgdu fram úrslitið av síni kanning, vístu tey á, at ikki var neyðugt at lata vatn renna eftir skeriborðinum.

Á onkrum flakavirkjum skera tær á turrum borðum, onnur hava eitt sindur meira fløtt vatn.

Kannast skal nú, hvønn mun hetta ger, og tí verða vald út nøkur ymisk virki at gera mátingar á. Í mars mánaði kemur ein maður higar frá Hygiejnisk Institut, men ætlanin er at Arbeiðseftirlitið sjálvt skal gera mátingarnar, sigur Eli Davidsen.

Samstarvið millum Hygiejnisk Institut og Arbeiðseftirlitið kom í lag um hetta málið á eini ráðstevnu í Danmark í fjør. Ætlanin er at leggja úrslitið av kanningini fram á eini norðurlendskari ráðstevnu, ið verður í Reykjavík seinni í ár.

randi

Flyta inn onkuntíð í februar

Arbeiðið við at byggja íbúðirnar uppi á Berjabrekku í Havn hevur gingið seint. Og ger tað framvegis. Upprunaliga varð sagt, at tey fyrstu kundu flyta inn seinasta heyst, men tað er útsett nakrar ferðir. Seinastu boðini ljóðaðu, at tær fyrstu íbúðirnar skuldu verða klárar at flyta inn í um mánaðarskiftið januar februar, men enn er eingin búseting á Berjabrekku.

Gudmund Hansen, arkitektur, sum saman við Albert Isfeld, stendur fyri arbeiðinum, væntar nú, at tær fyrstu 10 íbúðirnar verða lidnar at flyta inn í onkuntíð í hesum mánaðinum. Nakrar fáar eru so at siga lidnar, men væntandi verða allar 10 latnar eigarunum í senn.

Samstundis verður farið at hampa økið uttan um, fáa mold og gera gøtur.

Gudmund Hansen heldur, at arbeiðið nú fer at ganga stútt, soleiðis at tær næstu íbúðirnar verða lidnar skjótt.

Bæði veðurlag og trot á arbeiðsmegi fáa skyldina fyri, at arbeiðið er so nógv seinkað. Av regni tornaði viðurin ikki, tað stóð á at fáa gjørt elementini orsakað av, at elementfyritøkan ikki fekk fólk, og arbeiðsplássinum á Berjabrekku hevur eisini vantað fólk.

Máta geislavirkni

Arbeiðseftirlitið fer nú at máta, hvussu nógv geislavirkni er í Føroyum.

allastaðni er meira ella minni radon-geisling, ið kemur úr jørðini og tilfari. Ofta verður henda geislingin nevnd í sambandi við betonghús.

Betonghús hava vit nógv í Føroyum. Arbeiðseftirlitið ætlar at gera mátingar bæði í yngri og eldri betonghúsum, og eisini í bergholum. Óivað eisini í kolaminunum, har luftskiftið er lítið.

Í Svøríki t.d. er radongeislingin stór. Hvussu er í Føroyum, veit eing in. At máta geislingin er ikki so torfør upp gáva, og ætlanin er a gera mátingarnar longu hesum mánaðinum, sig ur Eli Davidsen, stjóri Arbeiðseftirlitinum.